# Dýrur pakki

Tað var dýrt hjá Grønlandsbankanum at vera við í Bankapakka I hjá donsku stjórnini. Í roknskapinum fyri 2009 sæst, at í fjør kostaði bankapakkin Grønlandsbankanum 22 milliónir krónur. Stjórin í Grønlandsbankanum, Martin Kviesgaard, ásannar í ársfrágreiðingini, at tað var dýrt at vera við í Bankapakka I, men at tað kortini er gott fyri bankan, at hann er við har. Bankapakki I bleiv skipaður á heysti í 2008 og fer úr gildi tann 30. september í ár. Martin Kviesgaard sigur við Sermitsiaq, at bankin skal eisini rinda eitt tvítals milliónatal fyri Bankapakka I í ár.



virka. Treytin fyri at koma inn í kassan var, at limurin var undir 50 ár og hevði eina góða heilsustøðu.

Tað bar eisini til at koma inn sum stuðulslimur, sum ikki skuldi "nyde godt af Sygekassen." Hetta mundi vera ætlað teimum vælstillaðu, sum vildu stuðla tiltakinum.

Mánaðarliga limagjaldið var 30 oyru. Sjúkrakassin hevur eisini verið eitt slag av dagpengaskipan, sum rindaði endurgjald fyri mista inntøku undir sjúku og helvtina av læknahjálp og heilivági.

Í 1905 gjørdi sjúkrakassin fyrstu ferð sáttmála við ein lækna, nevniliga Hilmar J. Fridericia. Hann skuldi hava samsýning samb. tí lógaruppskoti sum var um gjald fyri føroyskar sjúklingar. At taka eina tonn kostaði 1 kr, og gjaldið fyri at hjálpa til við føðing var 10 kr.

Inntil 1906 var einki goldið í ómaksløn fyri sjúkrakassaarbeiðið, men nú skuldi kassameistarin hava 10% av teirri upphædd, sum læknin fekk.

Sjúkrakassin gjørdi nógvar royndir at fáa hann statsgóðkendan. Hetta eydnaðist í 1911 við tí statsstuðli sum hetta merkti. Tá kom eisini rættulig kapping um medisinsølu millum apotekararnar Olaf Finsen og Johs. Djurhuus. Teir yvirbjóðaðu hvønn annan við sømdum til sjúkrakassan, men tað endaði við, at Johs. vann, og at Finsen fór av landinum.

## Meginfelag stovnað

Í 1912 var Havnar Sjúkrakassi saman við øðrum sjúkrakøssum við til at stovna Meginfelagið av sjúkrakøssum. Hóast tað bert vóru sjúkrakassar í fýra bygdum, var brúk fyri einum samskipandi meginfelagi, eisini fyri eggja til at fleiri sjúkrakassar vórðu stovnaðir. Longu í 1914 vóru 17 sjúkrakassar, í 1920 vóru 31, og í 1930 gjørdist sjúkrakassin í Hesti/Koltri tann seinasti av 38 sjúkrakøssum í meginfelagnum.

Limatalið var eisini hesa tíðina nógv uppgangandi hjá sjúkrakøssunum. Limatalið í Havn var 295 í 1913 og í 1936 var tað farið upp um 2.000. Fyri alt landið var hækkingin frá 633 til 13.721 í sama tíðarskeið.

## Kempan Peter Jensen aftur á odda

Ein týðandi persónur eisini í meginfelagnum var kempan Peter Jensen, sum kom til Føroyar at agitera móti brennivínssølu í 1907. Hann verður annars mest settur í samband við mjólkaforsýningina og losjurørsluna. Men hann var eisini ein av oddamonnunum innan sjúkrakassarørsluna.

Hann var við til at stovna ein fráhaldssjúkrakassa, sum meira verður greitt frá í komandi parti í røðini Hendur ið Sleptu. Tá ið fráhaldssjúkrakassin varð lagdur saman við Havnar Sjúkrakassa gjørdist Peter Jensen formaður fyri samanlagda sjúkrakassan. Hann gjørdist eisini fyrsti formaður í Meginfelagið av sjúkrakøssum og fær høvuðsheiðurin fyri, at sjúkrakassaskipanin kom at virka so væl, sum hon gjørdi. Peter Jensen var eisini stovnari og nevndarlimur í Føroya Felag móti Tuberklasjúku, sum fekk bygt eitt heilt sjúkrahús!

Aðrir kendir sjúkrakassamenn í Havn hava verið Jógvan Rasmussen og Harry S. Johansen.

## Megnaði at lækka umsitingarkostnaðin pr. lim

Tað er sjálvsagt nógv meira, sum kundi verið sagt um sjúkrakassarnar og Havnar Sjúkrakassa. Teir hava øll hesi árini havt stóran týdning fyri sosialu trygdini í Føroyum. Framtíðin hjá sjúkrakøssunum hevur ofta verið uppi og vent. Innanhýsis hevur spurningurin verið reistur, um sjúkrakassarnir í størri mun skuldu vera fólksins umboð í heilsupolitikki. Nógvir landsstýrismenn í almannamálum hava havt sum setning at avtaka sjúkrakassarnar, og nú er tað so eydnast.

Vónandi verður hetta tann bati, sum boðað er frá. Men tað er í hvussu er vist, at hetta merkir meira "toppstýring", meðan tað frammanundan vóru vald umboð, sum stýrdu sjúkrakassarnar.

Havnar Sjúkrakassi hevði eitt umfatandi virksemi virksemi, nú hann varð afturlatin. Í 2008 var umsetningurin um 50 mill. kr. Størsta útreiðslan var til heilivág, 21 mill. 12 mill. krónur fóru til vanliga læknahjálp. Tað hava verið um 12 ymsar stuðulsskipanir. Umsitingin kostaði 2,6 mill ella umleið 5% av umsetninginum. Tað verður neyvan gjørt bíligari.

Umsitingarútreiðslan fyri hvønn njótandi lim er enntá 3% minni í 2008 enn í 2003, meðan stórt sæð allar aðrar útreiðslur eru hækkaðar, summir munandi.

Tað er spell, at tað skuldi laga seg so, at øll henda servitan hjá sjúkrakassanum ikki skuldi koma eini komandi Heilsutrygd til góðar.

Men hann umboðaði so eina týdningarmikla tænastu fyri vanliga fólkinum í øll hesi árini. Tað skal so ikki verða gloymt.




*Ein kelda til hesa grein er 75 ára minningarritið hjá Havnar Sjúkrakassa. Janus Kamban teknaði kápumyndina*

